## Bogi við í javnleiki

Bogi Løkin spældi við frá byrjan til enda, tá Frem um vikuskiftið tók ímóti FC Fyn á heimavøllinum í Valby Idrætspark. Dysturin endaði við einum 0-0 javnleiki, har Frem hevði tað mesta spælið, meðan FC Fyn stóð ógvuliga kompakt og soleiðis fekk vart eina stigið. Frem, sum liggur á næstaftasta plássi í næstbestu donsku fótbóltsdeildini, skal skírisdag spæla lokaluppgerð ímóti AB.



## Rodrigo í Spania

Rodrigo, sum í 2008 spældi við KÍ, hevur fyri kortum gjørt sáttmála við felag í næstbestu sponsku fótbóltsdeildini, skrivar heimasíðan mess.fo. SD Huesca eitur nýggja felag hansara og tað liggur nummar 13 í næstbestu sponsku deildini, eftir at felagið flutti upp fyri tveimum árum síðani. Síðani Rodrigo spældi við KÍ, var hann í felagnum, FC Karpaty Lviv, sum spælir í bestu ukrainsku deildini, áðrenn hann legði leiðina til Spania.

# Tríggjar ferðir Christian

**Christian Lamhauge Holst skoraði trý mál, Silkeborg fekk trý stig og yvirtók triðja plássið í bestu donsku fótbóltsdeildini. – Eg kann ikki siga annað, at eg havi tað rættiliga gott nú, sigur føroyski landsliðsleikarin**



rolant@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam



Christian Lamhauge Holst er ein vandamikil harri. Higartil hevur hann gjørt níggju mál í landskappingini og fýra í steypakappingini
Mynd: David Bering/Polfoto

Christian Lamhauge Holst skoraði sítt fyrsta hat-trick í bestu donsku fótbóltsdeildini nakrantíð, tá Silkeborg vann 3-0 á HB Køge seinnapartin í gjár.

– Hetta er ein heilt serlig kensla. Ikki minst, tí at eg skoraði málini sum miðvallarspælari, sigur Christian Lamhauge Holst, sum er gamal áleypari og heldur, at hetta kemur honum til góðar nú.

– Sum áleypari vilt tú altíð skora mál, og soleiðis havi eg tað framvegis, hóast eg nú spæli longur afturi á vøllinum, sigur hann. Júst tað, at Christian ikki er í álopinum, tykist avgjørt ikki at vera nakar vansi hjá honum, kanska tvørturímóti.

– Nú eri eg ikki beinleiðis skjótur, so eg royni at passa tað soleiðis, at eg komi sníkjandi inn í feltið aftan fyri hinar. Sostatt fái eg nakrar kjansir, samstundis sum eg eri partur av uppbyggjandi spælinum, og tað dámar mær væl, greiðir Christian Lamhauge Holst frá.

Tað er í hesum síðstnevnda leikluti, at vit kenna Christian Lamhauge Holst best á føroyska landsliðnum. Hinvegin er tað ógvuliga smátt við málum í landsliðsbúnanum, og tað ilskast hann um.

– Tað er bæði undarligt og irriterandi, heldur hann.

### Skemta við bronsuni

Fyribils kann Christian tó fegnast um tey níggju málini, hann hevur gjørt fyri Silkeborg í landskappingini ár. Tað eru bara tríggir spælarar, ið hava skotið fleiri mál enn hann, og hann og liðfelagin, Lecic, eru vandamesta álopsparið í donskum fótbólti. Tilsamans hava teir báðir staðið fyri 20 av teimum 39 málunum hjá Silkeborg.

Aftrat mongu málunum kann Christian Lamhauge Holst eisini fegnast um triðja plássið, hann og Silkeborg hava yvirtikið, eftir at bæði Esbjerg og Aab settu stig til. Tað eru tó 10 dystir eftir at spæla av kappingini og hann sigur eisini, at teir ikki hugsa um bronsukrónurnar enn.

– Men av og á skemta vit við, at tað hevði verið stuttligt, um vit sum uppflytarar megnaðu at halda triðja plássið, sigur hat-trick hetjan hjá Silkeborg, Christian Lamhauge Holst.

# Aftur at verja Neistamálið

**Emil K. Jacobsen verður í hópinum hjá Neistanum, sum skal spæla FM-finalur móti Kyndil í páskavikuni**



uni@sosialurin.fo
Uni Holm Johannesen

– Vit hava framvegis spælaraloyvið hjá honum, og hann er sinnaður at koma til Føroya. Men tá er ikki sagt, at Ári Dam ikki fer at verja málið. Vit vilja sjálvsagt verða so væl fyri sum gjørligt til finalurnar, og Emil K. Jacobsen styrkir heilt víst um hópin, sigur Ingi Olsen, ið sostatt váttar, at Neistin styrkir seg til FM-finalurnar ímóti grannunum úr Kyndli.

Emil K. Jacobsen, sum ikki hevur spælt hondbólt síðan hann var í Føroyum, royndist sera væl, tá hann vardi málið hjá Neistanum í steypafinaluni í januar – forrestin eisini ímóti Kyndli. Ta ferðina spældi hann eisini ein landskappingardyst fyri teir bláu.

Danski málverjin er 29 ára gamal, og hevur spælt tveir dystir fyri danska A-landsliðið, umframt at hann hevur spælt 10 U-landsdystir fyri Danmark.



Danski málverjin, Emil K. Jacobsen, vardi málið hjá Neistanum í steypafinaluni, og nú kemur hann aftur til Føroya at hjálpa Neistanum í FM-finalunum
Mynd: Álvur Haraldsen